Løgmansskrivstovan

Dagfesting:	11. desember 2025
Mál nr.:	25/29119
Málsviðgjørt:	SR
Ummælistíð:	Ikki verið til ummælis
Eftirkannað:	10.11.2025

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m.
(67 ára pensjónsaldurin hjá landsstýrisfólki eftir gomlu skipanini fylgir fólkapensjónsaldri)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 10 frá 8. januar 1993 um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m., sum broytt við løgtingslóg nr. 84. frá 15. mai 2001, løgtingslóg nr. 170 frá 21. desember 2001, løgtingslóg nr. 65 frá 18. mai 2006 og løgtingslóg nr. 71 frá 19. mai 2014, verður í § 13, stk. 2 aftan á 3. pkt. sum nýtt pkt. sett: "Tó verður 67 ára pensjónsaldurin hjá landsstýrismonnum broyttur til vanliga fólkapensjónsaldurin í løgtingslóg um almannapensjónir."

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið
Í almenna kjakinum hevur, av røttum, verið reistur kritikkur av at bara fólkapensjónsaldurin er hækkaður, meðan landsstýrispensjónsaldurin, eftir gomlu skipanini, hevur staðið í stað. Tí er hetta uppskot tikið upp.

1.2. Galdandi lóggáva

Sbrt. § 1, stk. 7 í galdandi løgtingslóg um samsýning og eftirløn landsstýrismanna v.m, rindar landið 15% av lønarsamsýningini, sbrt. stk. 1, afturat í eftirløn í eina eftirlønarskipan, góðkend av landsstýrinum. Landsstýrisfólk fáa ikki longur eftirløn goldna úr landskassanum.

Sbrt. § 9 í eftirlønarlógini, kann eftirlønarútgjald fyri landsstýrisfólk, úr eftirlønarskipanini, í fyrsta lagi byrja, tá ið eftirlønarsamanspararin nær fólkapensjónsaldri sbrt. lóg um almannapensjónir, og í seinasta lagi tann dagin, hann fær fólkapensjón.

Fyri landsstýrisfólk, sum sótu áðrenn 15. september 2015, galda gomlu reglurnar enn um útgjald av eftirløn úr landskassanum við 67 ára aldur; í kvalifiseraðum førum frá 60 ára aldri.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at tryggja, at landsstýrispensjónsaldurin, sum eftir gomlu skipanini er 67 ár, av sær sjálvum alla tíðina er knýttur at tí til eina og hvørja tíð galdandi fólkapensjónsaldri.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Uppskotið knýtir 67 ára aldursásetingar í landsstýrispensjónslógarásetingunum at verða knýttar at fólkapensjónsaldrinum.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur ikki verið sent til ummælis.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður, at uppskotið minkar um útreiðslur landskassans.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið hevur ikki nakrar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki nakrar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki nakrar serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Landsstýrismenn og landsstýriskvinnur, eftir gomlu skipanini, fáa seinri pensjón.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Nei, á hesum øki eru ikki millumtjóða sáttmálar, sum hava nakrar slíkar avleiðingar við sær.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið førir onki ósamsvar við sær mótvegis Hoyvíkssáttmálanum, Evropeiskamannarættindasáttmálanum, EMRS, ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Ongin markaforðing stendst av uppskotinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið inniheldur ikki slíkar ásetingar.

2.11. Skattir og avgjøld
Ongar skatta- ella avgjaldsásetingar eru í uppskotinum.

2.12. Gjøld
Ongar gjaldsásetingar eru í uppskotinum.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Nei.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Nei.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nei.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Nei.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Ja	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Tá ið orðið fólkapensjónsaldur verður nýtt, verður hugsað um tann aldur, sum ásettur er í teirri til eina og hvørja tíð galdandi fólkapensjónslóggávu fyri at fáa fólkapensjón, í løtuni § 4 í løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensjónir o.a., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 117 frá 9. desember 2024.

Til § 2
Ongar serligar umstøður eru, sum gera, at neyðugt er at hava annan gildiskomudag enn dagin eftir, at løgtingslógin er kunngjørd.

Løgmansskrivstovan, 11. desember 2025

Aksel V. Johannesen
løgmaður

/ John Rajani

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur